## Norskur tjóðardagur haldast í Føroyum

Í morgin 17. mai fara føroyingar og norðmenn í Føroyum at hátíðarhalda norska tjóðardagin. Hátíðarhaldið verður í Sjónleikarhúsinum í Havn. Byrjað verður kl. 17. Tá fer Hanus G. Johansen at syngja vísur eftir Jakob Sande frá fløguni »Frå leddiken«, sum hevur fingið sera góð ummæli í Noregi. Aftaná verða pylsur og sodavatn til børnini, meðan tey vaksnu fáa ein drekkamunn og køkur. Skipað verður fyri onkrum spæli fyri børnini uttanfyri, um veðrið verður til vildar. Tað er Føroyskt Norskt Felag, sum skipar fyri tiltakinu, ið kostar 100 krónur fyri vaksin, men er ókeypis fyri børnini. Øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir.



# Tvey frálandaskip aftr

**Monrad Dalbúð, skipari, heldur, at kunnu føroyskir myndugleikar gera FAS-skipanina uppaftur betri og enn meira attraktiva, er hugsandi, at føroyski skipaflotin í frálandavinnuni fer at veksa uppaftur meira. - Tað eru bara føroyingar, sum sigla við skipunum hjá Team Beredskab Sp/f, og hesi bæði seinastu skipini geva arbeiði til 42 føroyingar**

FRÁLANDAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið Team Beredskab Sp/f eigur sambært føroyska Skipalistanum standby-skipini, Strilhauk og Supporter. Útgerðarmaður er Torleivur M. Mikkelsen, ið vit kenna frá felagnum Thor Shipping.

Hesi skipini hava heimstað í Havn og sigla undir føroyskum flaggi. Tað eru føroyingar, sum manna Strilhauk og Supporter.

Hetta er eftir øllum at døma ein sera áhugaverd tíð hjá føroyingum í frálandavinnuni, og líkt er til, at FAS-skipaskrásetingin í Føroyum stendur seg væl - ja, so væl, at eitt nú norðmenn eru farnir at hyggja at føroysku skipanini.

### Fleiri skip

Føroyska reiðaríið mennist í hvørjum og fjølgar um frálandaflotan.

Í gjár klokkan 15 kom enn eitt skip undir føroyskt flagg, og í komandi viku kemur tað fjórða í røðini. Hesi bæði seinnu eru munandi størri enn tey bæði fyrru.

Skipið, sum kom undir føroyskt flagg í gjár, eitur Prosper. Gamla navnið er Normand Prosper, og nú skipið er undir føroyskum flaggi er so bara Prosper-navnið eftir.

Í morgun hevði Sosialurin maskinmeistaran, Vilhelm Nielsen, í telefonini, og tá eydnaðist okkum eisini at fáa fatur á skiparanum, Monrad Dalbúð, ið er vágbingur, sum býr í Runavík.

- Eg og skiparin hava verið her yviri í eina viku, og nú veittrar føroyska Merkið í mastrini á Prosper, sigur Vilhelm Nielsen.

Mánadagin í komandi viku kemur so eisini Ranger undir føroyskt flagg, og ætlandi fer yvirtøkan fram í Haugesund.

Hesi bæði skipini fara í vinnu sum standby-skip, men hava eisini møguleikar at gera supply-uppgávur. Vit kunnu siga, at skipini soleiðis eru kombinerað standby og supply-skip.




### Spennandi tíð

- Hetta er triðja skipið í røðini, ið eg sum skipari fyri Team Beredskab Sp/f havi verið við til at flagga undir føroyskt flagg í tvey ár. So, hetta er ein heilt ótrúliga spennandi tíð hjá reiðarínum, okkum sum sigla við hesum skipum og hjá føroyskari frálandavinnu sum heild, sigur skiparin, Monrad Dalbúð.

Skiparin vísir á, at Prosper er slakar 80 metrar langur og slakar 15 metrar breiður, og tískil er hetta størsta skipið hjá føroyska reiðarínum, Team Beredskab Sp/f.

- Ranger, sum kemur undir føroyskt flagg mánadagin, er slakar 70 metrar langur og einar 14 metrar breiður, leggur Monrad Dalbúð aftrat.

Hann sigur, at Prosper, sum hevur tveir 4.000 hk. motorar, er væl útgjørdur við eitt nú sonevndu FIFI1-



*Prosper, sum hevur tveir 4.000 hk. motorar, er væl útgjørdur við eitt nú sonevndu FIFI1-skipanini, ið kann sløkkja velduga stórar eldar*